# Badmintonlandsliðið úttikið

**Landsliðsvenjarin í badminton, Jonas F. Tai, hevur tikið út teir sjey leikararnar, sum skulu umboða Føroyar í badminton á oyggjaleikunum í Hetlandi í summar.**

BADMINTON

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sjey leikarar eru á badmintonlandsliðnum. Vanligani hava tað bara verið leikarar úr HBF í Havn, sum hava verið á landsliðnum, men í ár er ein leikari úr VÍF eisini við á liðnum.

### Yngsti leikarin er 14 ár

Teir sjey leikararnir eru hesir: Aksel Poulsen, Bjartur Lamhauge, Erland Poulsen, Rani í Líð, Gurið Poulsen og Brynhild Carlsson úr HBF og Guðrun Poulsen úr VÍF. Vert er at leggja til merkis, at Brynhild Carlsson, sum er yngsti leikarin á liðnum, einans er 14 ára gomul.

Eitt føroyskt úrvalslið í badminton var um vikuskiftið á ferð í Hetlandi, har kappast var við hetlendskar badmintonleikarar. Nógvir ungir leikarar vóru við á ferðini, og fríggjadagin dystaðust føroysku ungdómsleikararnir við hetlendsku javnaldrarnar. 26 dystir vóru á skránni, og føroyingarnir vunnu teir 17, meðan hetlendingar vunnu níggju.

Leygardagin var skipað fyri einstaklingakapping fyri vaksin, og tá endaði tað við einari reinari føroyskari finalu í einmansleiki hjá monnum. Tað vóru teir báðir Niclas Eysturoy og Erland Poulsen, sum brustu saman, og Erland vann dystin.

Tvímansleikin hjá monnum vunnu Bjartur Lamhauge og Aksel Poulsen á einum hetlendskum pari.

Fremsti kvinnuligi føroyski badmintonspælarin, Gurið Poulsen, vann seg eisini fram í finaluna í einmansleiki, har mótstøðukvinnan var hetlendksa Anne Wood. Her gjørdist talan um ein drúgvan dyst, sum hetlendska kvinnan tó vann eftir trý sett.

Hinvegin stóðu føroysku leikararnir seg ikki so væl í tvímansleiki hjá kvinnum og blandaðum tvímansleiki, og sagt verður, at neyðugt verður at arbeiða hart við blandaða tvímansleikinum undan oyggjaleikunum, sum fara av bakkastokki um tveir mánaðar.

adidas
Máltindurin

**Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| Súni Olsen | GÍ | 5 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 5 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 5 |
| Rúni Nolsøe | HB | 4 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 4 |
| Allan Mørkøre | B36 | 3 |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 | 3 |
| Hans á Lag | HB | 3 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 3 |
| Atli Danielsen | KÍ | 3 |
| Andy Olsen | NSÍ | 3 |
| Bogi Gregersen | Skála | 3 |
| Óli Johannesen | TB | 3 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Rene Thomsen | Sumba | 4 |
| Clayton Soares | B71 | 3 |
| Dánjal Pauli Dalbø | GÍ | 3 |
| Uni Arge | HB | 3 |
| Súni Fríði Barbá | AB | 2 |
| Eli Hentze | B71 | 2 |
| John Eystberg | GÍ | 2 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 2 |
| Fróði Joensen | LÍF | 2 |
| Magnus Skorðalíð | LÍF | 2 |
| Petur Sjúrðaberg | LÍF | 2 |
| Jóan Pauli Olsen | Sumba | 2 |

**formuladeildin**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 7 | 5 - 1 - 1 | 11 | 2 | 9 | 16 |
| 2 Skála | 7 | 4 - 2 - 1 | 17 | 10 | 7 | 14 |
| 3 HB | 7 | 4 - 0 - 3 | 18 | 12 | 6 | 12 |
| 4 NSÍ | 7 | 3 - 3 - 1 | 14 | 9 | 5 | 12 |
| 5 ÍF | 7 | 3 - 3 - 1 | 12 | 11 | 1 | 12 |
| 6 KÍ | 7 | 2 - 2 - 3 | 10 | 12 | -2 | 8 |
| 7 VB | 7 | 2 - 1 - 4 | 4 | 11 | -7 | 7 |
| 8 TB | 7 | 1 - 3 - 3 | 6 | 10 | -4 | 6 |
| 9 EB/Streymur | 7 | 1 - 3 - 3 | 6 | 13 | -7 | 6 |
| 10 GÍ | 7 | 1 - 0 - 6 | 9 | 17 | -8 | 3 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 2 | 2 - 0 - 0 | 4 | 0 | 4 | 6 |
| 2 Royn | 2 | 2 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 6 |
| 3 HB | 2 | 1 - 0 - 1 | 7 | 4 | 3 | 3 |
| 4 B71 | 2 | 1 - 0 - 1 | 6 | 4 | 2 | 3 |
| 5 Sumba | 2 | 1 - 0 - 1 | 11 | 10 | 1 | 3 |
| 6 LÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 8 | 8 | 0 | 3 |
| 7 AB | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 8 FSV04 | 2 | 1 - 0 - 1 | 1 | 1 | 0 | 3 |
| 9 B36 | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 10 GÍ | 2 | 0 - 0 - 2 | 5 | 15 | -10 | 0 |

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

# B68 og Royn á odda

**Eftir tey bæði fyrstu umførini eru bert tvey lið, sum hava fult stigatal í aðru deild**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*

B68 og hini. Soleiðis ljóðaðu staðfestingarnar, áðrenn farið varð undir ársins útgávu av fótbóltslandskappingini í 2. deild, og tó at tað enn bert eru leikt tvey umfør, so hava toftamenn sjálvir í øllum førum ikki avsannað hetta.

Leygardagin høvdu teir annað vikuskiftið á rað dyst móti havnarfelagi. Hesaferð var tað HB, sum kom inn á Toftir, og her gjørdist talan um tryggan sigur hjá B68. Sum skilst, so var talan í allar mátar um eitt sannførandi avrik, har HB ikki fekk teir stóru møguleikarnar, og har einki spurnartekin kundi setast við sigurin hjá heimaliðnum.

### Royn fylgir við

Enn hava toftamenn so fylgi av Royn í oddastríðnum. Hvalbingar vitjaðu um vikuskiftið B36, og annað vikuskiftið á rað máttu árstalsfelagið taka til takkar við teprum tapi.

Sagt verður úr Gundadali, at størsti trupulleikin hjá B36 er, at teir í løtuni ikki hava nakran fastan mann at seta í málið, og at hetta hevur kostað í teimum báðum fyrstu dystunum.

Tað munnu hvalbingar tó ikki leggja tað stóra í. Serliga fyri steðgin royndu teir at trýsta, og tað eydnaðist teimum eisini at skjóta seg upp á 2-0, áðrenn B36 fekk minkað um munin. Eftir steðgin kom einki mál, og so vóru enn trý stig á veg suður til Hvalbiar.

### FSV04 á talvuni

Á Sandi hevði B71 vitjan av LÍF. Tað kundi líkst einum dysti millum tvey lið, sum ætla at gera seg galdandi í ár, og eftir góða avrikið á Tvøroyri, fingu sandoyingarnir aftur hesaferð fult. Talan var tó um rokdyst, har ikki færri enn tríggir menn vórðu riknir av vølli.

Áðrenn hetta hevði B71 tó lagt seg væl og virðiliga á odda, og hóast teir bert vóru níggju mans seinastu løtuna, so var sigurin ongantíð í vanda.

Tað var hann heldur ikki í Sumba, tá GÍ vitjaði. Gøtumenn verða av mongum mettir sum niðurflytingarkandidatar, og Sumba hevði heldur ikki stórvegis trupulleikar av dystinum. Stóri maðurin í Sumba var Rene Thomsen, sum ikki færri enn fýra ferðir var á blettinum.

Seinasti dysturin var í Sandavági, har AB vitjaði. Báðir partar verða mettir at hava møguleikan at gera seg galdandi í ár, og talan gjørdist eisini um eina tætta uppgerð.

Tað varð tó FS Vágar, sum dróg longra stráðið. Sonni Johansen gjørdi skjótt av, tá møguleikin beyðst, og so kundi heimaliðið dúva upp kontrabólt. Tað gav tó ikki nakað beinleiðis úrslit frameftir, men teir megnaðu at halda argjamonnunum burturi, og tað fyrst og fremst hetta, sum denturin varð lagdur á.